# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fortreytir fyri einum sjálvstøðugum Føroyum

Tað stundar til løgtingsval. Eitt týðandi val fyri okkum øll, nú lunnar sohvørt verða lagdir undir einar stjálvstøðugar Føroyar. Har støðugt fleiri politikarar ganga inn fyri yvirtøkum, blokkniðurskurði og fólkaatkvøðum um framtíðar støðu okkara í ríkinum og í heimssamfelagnum. Flestu føroyingar vilja vera sjálvbjargnir, standa á egnum beinum. Flestu okkara síggja Føroyar einaferð í framtíðini sum eina sjálvstøðuga tjóð við tøttum samstarvi við bæði Ríkisfelagsskapin og við heimin uttanfyri.

Spurningurin er, hvussu og nær vit kunnu taka endaliga stigið at gerast sjálvstøðug tjóð. Antin við halla til samband ella sjálvstýri, so er greitt, at stórar broytingar eru farnar fram í ríkisrættarligu viðurskiftunum. Blokkurin er skerdur og yvirtøkurnar vornar fleiri og fleiri. Samtíðis hava vit fingið eitt nýtt ættarlið av útbúnum føroyingum, sum í størri mun vilja sjálvstýrisleiðina. Eisini tey heilt ungu vilja hesa leiðina. Sama kann sigast um mong vinnulívsfólk her á landi. Tað er tí ein spurningur um, hvat vit búskaparliga megna, og hvussu útlitini síggja út, til vit taka endaligu avgerðina. Løgmaður segði herfyri, at blokkurin skal vera burtur í 2015. Varaløgmaður helt fyri, at finna vit olju, so er tað lykilin til sjálvstøðugar Føroyar.

Ein týðandi spurningur er, hvussu vit so duga at húsast við tí tilfeingi og teimum virðum, ið eru givin okkum frá Skaparans hond. Duga vit at handfara tey? Tað er hetta, sum komandi valstríð eigur at snúgva seg um. Duga vit ikki at handfara tey, so megna vit heldur ikki at standa á egnum beinum.

Her er landsplanlegging mest týðandi svarið, og Føroyar sum eitt valdømi er kanska lykilin til at fáa landsplanlegging á dagsskránna. Nú kann eingin lokalpolitikari halda allari tjóðini sum gísla og tvinga ígjøgnum íløgu- og rakstrarloysnir, sum ikki taka atlit til heildina. Vit hava ikki ráð til dupultfunktiónir, skulu vit gerast sjálvstøðug tjóð. Tað loyvir avmarkaða tilfeingið ikki. Vit hava gjørt íløgu í Norðoyartunnilin. Harvið stytt munandi um tíðina at koyra til miðsteðarøkið. Samtíðis ætla vit at útbyggja Klaksvíkar Sjúkrahús fyri knappar 100 mill. kr., og harvið verða færri pengar til at optimera okkara høvuðssjúkrahús. Vilja politikarar einar sjálvstøðugar Føroyar má vend koma í. Íløgur í infrastruktur mugu síggjast aftur í íløgu- og rakstrarpolitikkinum eitt nú á heilsuøkinum.

Sandoyartunnilin eigur eisini at bíða. Heldur eiga vit at brúka íløgur til at menna útbúgving og mentan og harvið vinnulív, sum umframt nýbrotið "Føroyar sum eitt valdømi" eru lyklaorðini til einar framtíðar sjálvstøðugar Føroyar.

**Sosialurin**

## Hoyvíkssáttmálin 1 ár




1. november var eitt ár síðani, Hoyvíkssáttmálin kom í gildi. Sáttmálin er sermerktur bæði fyri Ísland og Føroyar. Við sáttmálanum eru londini skipaði í eitt felags búskaparøki, har vørur, tænastur, kapitalur og persónar hava frítt at fara.

Í alheimsgerðini verður heimurin støðugt minni, eins og lond støðugt verða tættari bundin hvør at øðrum. Ísland og Føroyar eru nærskyldar tjóðir og hava í áravís bygt sítt samskifti og samstarv á vinalag, virðing og álit. Við Hoyvíkssáttmálanum avgjørdu londini at ganga eitt stig longur og seta á stovn felags fíggjarumveldi, íbúgvarum hjá báðum londunum til fyrimunar.

Ein av grundleggjandi hugsanunum við Hoyvíkssáttmálanum er, at londini skulu geva borgarum hjá hvørjum øðrum somu sømdir, sum londini veita teirra egnu borgarum. Sáttmálin gevur persónum og fyritøkum í Føroyum og Íslandi trygd, tí hesi hava fingið javnbjóðis møguleikar, um tey hava hug at royna seg í ávikavist Íslandi og Føroyum. Á summum økjum hevur ongin forðing verið frammanundan, men júst hendan trygdin um javnbjóðis møguleikar hevur stóran týdning, serliga fyri smærri fyritøkur og er við at geva teimum dirvi at fara út um landoddarnar at royna seg.

Føroyar og Ísland hava havt gott samband og samstarv frá gamlari tíð. Samstarvið hevur tey seinnu árini rættiliga tikið dik á seg eisini innan vinnu og mentanarlívið, og Hoyvíkssáttmálin styrkir munandi um hesa gongd. Hóast samstarv longu var frammanundan, hevur sáttmálin økt um møguleikarnar. Hetta sæst í øllum teimum lógum, ið eru broyttar, sum fylgjur av sáttmálanum. Hesar lógarbroytingar prógva, at londini hava givið borgarunum og feløgum hjá hvørjum øðrum sømdir og møguleikar, ið ikki vóru frammanundan.

Tá ið Hoyvíkssáttmálin kom í gildi, bleiv ásannað, at tað hevði gagnað partunum at skipa sendistovur hjá hvørjum øðrum fyri betur at kunna gera brúk av teimum møguleikum, ið sáttmálin hevur við sær. Íslendska sendistovan í Tórshavn lat upp 1. apríl, og var hetta tann fyrsta diplomatiska umboðanin í Føroyum í áratíggju. Føroyska sendistovan í Reykjavík lat upp 15. september. Sendistovurnar koma uttan iva at verða báðum londunum til gagns og fara at varðveita tey góðu sambondini millum Ísland og Føroyar.

Umframt at geva vinnulívinum øktar møguleikar, er ætlanin við Hoyvíkssáttmálanum somuleiðis at leggja lunnar undir samstarv, eitt nú innan mentan, útbúgving, umhvørvi, ferðavinnu, gransking og heilsutænastu. Sum liður í hesum ætlanum undirskrivaðu vit eina felags fráboðan um samstarv á heilsuøkinum, tá ið føroyska sendistovan í Reykjavík lat upp, og í hesum døgum verður arbeitt við at ítøkiliggera hesar ætlanir.

Føroyingar og íslendingar tóku eitt stórt stig við Hoyvíkssáttmálanum. Tá ið stór stig verða tikin, kann stúran kykna og ivi koma í. Serliga tá ið tosað verður um at lata upp áður ókendar marknaðir, eins og íslendingar upplivdu, tá ið teir gjørdust limir í EFTA. Tíðin hevur kortini víst, at limaskapurin í innara marknaðinum í Evropa hevur roynst sera væl, hóast Ísland er ein lítil tjóð samanborið við hini londini í EBS. Ísland er eitt tað besta dømi um, at smá lond kunnu standa seg í kappingini við tey stóru, um møguleikarnir, ið millumtjóða samstarvi letur upp fyri, verða brúktir.

Hoyvíkssáttmálin er í sær sjálvum bert ein karmur, sum skal útfyllast og gagnnýtast, um hann skal roynast føroyska og íslendska fólkinum ein vinningur. Við sáttmálanum eru dyr latnar upp, og avbjóðingin er at gera brúk av teimum møguleikum, hann hevur við sær.

Tað eru øki, sum ikki beinleiðis eru fevnd av Hoyvíksáttmálanum. Tó ivast vit ikki í, at tær hugsjónir, sum sáttmálin er grundaður á, við tíðini fara at hava við sær, at forðingar og avmarkingar á hesum økjum eisini fara at verða tiknar burtur.

Vit vilja tí virka fyri øktum og enn breiðari samstarvi millum Føroyar og Ísland og vilja í felag arbeiða fyri at fremja og røkka hesi felags áhugamál.

**Jóannes Eidesgaard,**
***løgmaður***

**Ingibjörg Sólrún Gísladóttir,**
***uttanríkisráðharri Íslands***

## Bræv til landsins kosnu menn/kvinnur

Við hesum fáu orðum vil undirritaða saman við øðrum heita á tykkum - háttvirda tingmanning - um a stuðla/røkja Roynds Kolasølu.

Vit eru nógv, sum stúra fyri, at er einki kol at fáa í vetur, verður øskukalt nógva staðni.

Hugsið t.d. um Gásadal.

Tær øskukøldu

***Turid S., við mongum fleiri, Sørvági***

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.